## Fáa pískasløg fyri at roykja í studio

Á heimasíðuni hjá Ekstrablaðnum – eb.dk – ber til at síggja eitt langt innslag um føroyska bólkin The Dreams. Ekstrablaðið hevur verið á vitjan hjá bólkinum og gjørt eitt næstan fýra minuttir videoinnslag um teir. Prátað verður við tónleikararnar í The Dreams, og teir greiða eisini frá strangu reglunum í stóra húsinum, har teir búgva. Um teir roykja í studionum, fáa teir fimm pískasløg. Ekstrablaðið er mest vitjaða danska heimasíðan, og teirra videoinnsløg verða sædd av nógvum túsund fólkum um dagin.

## Lizzie er ikki til at vika

Eingin tekur Lizzie á Tjeklistanum hjá Danmarks Radio. Tað er útvarpsstøðin P3, sum sendir hitlistan, og seinastu vikurnar hevur føroyska songkvinnan Lizzie ligið ovast við sanginum Ramt I Natten. Sunnudagin var listurin dagførdur aftur, og enn einaferð var Lizzie ovast. Nú eru The Dreams eisini í uppskoti til listan við sanginum La' Mig Være, sum annars liggur ovast á einum øðrum hitlista – Boogie-listanum. Tað ber til at atkvøða fyri sangunum á Tjeklistanum umvegis heimasíðuna hjá DR.

# il føroyskt skipasmíð



Gunnar Mohr, fyrrverandi stjóri í Tórshavnar Skipasmiðju og Eyðfinn Egholm, sum tók við stjórastarvinum 1. februar, taka í hondina á hvørjum øðrum
Mynd: Jens Kr. Vang

Hann vísti eisini á ta menning, sum hevur verið á skipasmiðjuni og vísti við skemtiligum vendingum á munin millum føroyskan hugburð og hugburðin hjá eitt nú slipsamonnum í útlandinum, sum skipasmiðjan gjøgnum árini hevur samstarvað við.

Poul Mohr kann so sanniliga vera álvarsamur, men hann kann eisini vera óføra skemtiligur, tá ið hann er í tí rætta »essinum«, og tað var hann eisini við móttøkuna á Tórshavnar Skipasmiðju fríggjadagin.

Móttøkan eydnaðist sera væl, og nýggi stjórin fekk eisini høvi at hitta fleiri av teimum viðskiftafólkum og samstarvsfeløgum, sum Tórshavnar Skipasmiðja hevur kring um landið.



Tveir reiðarar, Gunnar Justinussen og Anfinn Olsen, sum um felagið Notio er nevndarformaður í Tórshavnar Skipasmiðju
Mynd: Jens Kr. Vang



130 fólk eru í starvi hjá Tórshavnar Skipasmiðju, og hesi høvdu eisini høvi at vera við til móttøkuna
Mynd: Jens Kr. Vang



Ímyndin av Tórshavnar Skipasmiðju í nýggjari tíð, Poul Mohr, heilsar nýggja stjóranum
Mynd: Jens Kr. Vang